# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Nøvnini á fimleikarunum



Vit høvdu herfyri hesa realskúlamyndina í blaðnum. Á myndini vóru ikki øll nøvnini, og okkurt navn var komið skeivt fyri. Vit hava nú fingið røttu nøvnini frá einum av okkara lesarum. Myndin er av fimleikarum umleið 1930.

Fimleikararnir eru f.v.: Leivur Jóanesarson, Poul Joensen (Poul í Mykinesi), Eiler Mikkelsen, Jens Guttesen, Ingolf Dam Jacobsen, Terkelsen (lærari), Esbern Simonsen, Ebbe Müller, Regin Dahl og Leivur Christiansen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 253)

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Eyðbjørn Petersen**
Fuglafjørður

andaðist mánadagin, 28. sept. 2009, 68 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 17.00 í Fuglafjarðar kirkju. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Anna, Jónhard, Hanna Maria og Ragnhard**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina peningagávu til kirkjuna í Fuglafirði.

## MERKISDAGAR

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 17. okt. kunnu hjúnini Aud og Siggvard, Joensen, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum: Lauritsargøta 7, 100 Tórshavn, frá kl. 17.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. okt. fyllir Hákun Debes, Kollafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin heima mikudagin frá kl. 17.

**80 ár**
Mikudagin 7. oktober Johannes Berg bilasølumaður 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Hotel Føroyum hetta sama kvøldið. Byrjað verður kl.18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

†

### Andlát og jarðarferðir

**Malfryd Solborg Andreasen, Oyndarfirði, ættað av Eiði**, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi hósdagin, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Dagurin**

5. oktober. Placidus, deyður í umleið 550. Tá ið Bænadikt úr Nurcia bygdi kleystrið Monte Cassino, fekk hann jørð at byggja á frá ríkum rómverja, Tertullus at navni. Placidus var sonur henda rómverja og gekk Bænadikti til handa. Kom sjálvur upp í munkaskipanina og eftir boðum Bænadikts bygdi hann eitt kleystur á Sikiloy. Kleystrið varð rænt og lagt í oyði av sjórænarum og Placidus dripin.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin